


# Føroysk list og listasøga

Framløga við rundvísing 23.02.23

Anna Maria Dam Ziska, Listasavn Føroya

# Byrjanin til føroyska myndlist



**Díðrikur á Skarvanesi**
1802-1865

- Føddur á Stóru Dímun og gjørdist seinni húskallur á Skarvanesi.
- Málaði fyrstu listaverkini, sum vit kenna til í føroyskum høpi uml. ár 1830.

# Fyrstu landslagsmálararnir

Niels Kruse (1871-1953)

Kristin í Geil (Christen Holm Isaksen)(1877-1935)

Jógvan Waagstein (1879-1949)



Niels Kruse, *Vetrarsól á Eiði*, 1941



Kristin í Geil, *Hørgin í Nólsoy*, 1910



Jógvan Waagstein, *Hoyvík*, 1940

## Bergithe Johanessen
1905-1995

- Fyrsta listafólkið úr Føroyum, ið fekk útbúgving innan list
- Gekk á Sidcup School of Art (1923-1925)
- Síðani á Det Kongelige Danske Kunstakademi, Keypmannahavn (1925-1931)



Bergithe Johannessen, *Skerjut strond*, 1964

## Sámal Joensen-Mikines
1906-1979

- Millum fyrstu lærdu listafólkini í Føroyum
- Gekk á Det Kongelige Danske Kunstakademi í árunum 1928-1932 hjá lærarunum Ejnar Nielsen og Aksel Jørgensen
- Verður ofta nevndur "Faðirin at føroyskari list"



Sámal Joensen-Mikines, *Dansurin*, 1944

# Søgan hjá Listasavninum:

## Listafelag Føroya og Føroya Almenna Listasavn

- Tá 2. veraldarbardagi brast á, vóru fleiri føroysk listafólk búsitandi í Keypmannahavn fyri at útbúgva seg innan listina. T.d. Ruth Smith, Jóannis Kristiansen, Sámal Joensen-Mikines, Elinborg Lützen og Janus Kamban.
- Føroysku listafólkini í Keypmannahavn settu á stovn Listafelag Føroya tann 23. mars í 1941, undir krígnum. Felagið hevði til endamáls at stuðla føroyskari list, keypa føroyska listaverk og at stovna eitt føroyskt listasavn.
- Í 1970 lat Listafelagið byggja Listaskálan.
- Eftir kríggið stovnaði Føroya Løgting í 1948 Føroya Almenna Listasavn við tí fyri eyga at skapa eitt alment savn av list.
- Í 1989 løgdu hesi bæði søvnini saman til tað, sum vit í dag kenna sum Listasavn Føroya.
- Í 1993 varð tilbygningur gjørdur til Listasavnið.



William Heinesen, Hanus við Høgadalsá, Steffan Danielsen og Janus Kamban á Ólavsøkuframsýningini hjá Listafelagnum í 1958



## Stutt um Listasavn Føroya

- Fevnir um gott og væl 2800 listaverk og er størsta savnið av føroyskari list í heiminum.
- Hevur til høvuðsendamál og –uppgávu at savna, varðveita, granska í og miðla føroyska list.
- Bygningurin er frá ávikavist 1970 og 1993, og eru tað arkitektarnir J.P. Gregoriussen og Niels F. Truelsen, ið hava teknað.


Rundvísing á savninum